# 83 ára gamal – og málar enn

**LISTAVERK** Nógv tilkomin fólk í Vestmanna munnu minnast listamálaran, Jack Kampmann sum búði í Føroyum árini 1948-64. Ein teirra er tann skjótt 84 ára gamli málarin, Hanus Zachariasen í Vestmanna. – Ja, Jack. Hann var bæði ein raskur og dugnaligur málari, minnist hann afturá.

Snorri Brend

Hóast Hanus er komin rættiliga væl til árs, og legði profesjonella pensilin frá sær fyri mongum árum síðani, er hann altíð sinnaður at veita sínum nærmastu eina hond.

– Beint nú hjálpi eg abbasoninum at mála, greiðir Hanus frá. – Vit hava rokast nú í einar fjúrtan dagar.

Júst hetta við at mála hevur verið lívsstarv hansara. Nógvir bygningar og nógv skip eru málað hesi árini. Og sum nakað heilt serstakt, fekk Hanus eisini høvið at hjálpa Jack Kampman við at mála vísuna um Ormin Langa fyri eini 50 árum síðani.

Henda vísan varð málað á fleiri plátur, sum vórðu festar á yvirveggin í salinum í Gamla Skúla, sum vestmenningar kalla hann.

Myndirnar á hesi síðuni vórðu tiknar í desember 2007, og eru sera væl úr hondum greiddar. Nógv hava undrað seg yvir hvar myndirnar vóru blivnar av, – ikki minst eftir at Gamli Skúli varð tikin niður fyri nøkrum árum síðani.

Tær eru umvældar, og vórðu síðani settar í eitt rúm í Vestmanna skúla, har tær vórðu tær tiknar fram einaferð enn til heiðurs fyri Sosialin fyri hálvum triðja ári síðani.

– Eg hjálpti honum við at mála hesa vísuna av berum áhuga. Hetta var fyri tað mesta gjørt í frítíðum, vísir Hanus á.

> **Jack kundi arbeiða við fullari ferð í eina tíð, men kundi so brádliga lata seg í pussið og ganga soleiðis í fleiri dagar, áðrenn hann herjaði á aftur við penslinum**

## Upp á tekjuna

Tað eru kortini liðin mong ár, síðani Hanus Zachariasen á fyrsta sinni fór í holt við tað yrkið, sum kom at gerast hansara í meiri enn 45 ár.

– Eg minnist ein dag í 1943, tá vit høvdu arbeitt í torvi í dalinum. Heimkomin um kvøldið sá eg eina lýsing í Dimmalætting, har Jørgen Jørgensen, málarameistari úr Miðvági, sum tá búði á Glyvrum, søkti eftir lærlingi.

– Eg søkti, og eg fekk plássið og fór beinanvegin til arbeiðis í Syðrugøtu, greiðir Hanus frá.

Fyrsta uppgávan hansara var at reinsa rust á eini tekju hjá Poul Huus. Á hesi tekjuni lá hann so nakrar dagar, til øll húsini vóru málað.

Seinni fekk hann pláss hjá Andreas Mouritsen, málarameistara í Havn, og fór á Tekniska Skúla í Århus 1. oktober 1947 fram til 1. apríl 1948, tá hann varð útlærdur sum málari.

– Eg tók ikki sveinaprógv, tí tað varð sjáldan gjørt tá í tíðini, greiðir Hanus frá.

## Góður og raskur

Ein mánað seinni – altso í mai mánaði 1948 – kom Hanus aftur til Vestmanna og málaði eitt sindur har og aðrastaðni.

Um hetta mundið var Jack Kampmann eisini komin til bygdina, og hevði átikið sær ávís málaraarbeiði. Millum hesi var stóri bygningurin – fiskahúsið – hjá D. P. Olsen og øðrum, skúlan og annað. Nevnast kann, at Jack Kampmann eisini myndprýddi skúlarnar á Glyvrum og tann á Toftum.

Jack Kampmann (1914-1989) varð annars føddur í London og hevði donsk foreldur. Hann vaks upp í USA og varð útlærdur málari og seinni listamálari í Danmark. Tað var í stóran mun tann listarligi parturin, sum kom




**ORMURIN LANGI**

*Hanus dugdi bæði at mála stórt og smátt. Fyri eini 50 árum síðani hjálpti hann listamálaranum Jack Kampmann at mála vísuna um Ormin Langa. - Eg gjørdi hetta av berum áhuga, sigur Hanus Zachariasen*

*Mynd: Jens Kristian Vang (2007)*